Tey kríggjast enn um verkamannafylkingina

Løgtingformaðurin gjørdi av, at VMF ongan framsøgumann hevði rætt til, tá tey ikki sjálvi kundu finna út av, hvør skuldi vera framsøgumaður

JÓANNES HANSEN

Eg eri framsøgumaður fyri verkamannafylkingina, VMF, segði Kristian Magnussen. Eg eri framsøgumaður fyri VMF, segði Ingeborg Winther.

Stríðið um hvør umboðar VMF í tinginum stóð aftur í ljósum loga, tá farast skuldi undir umrøðuna av løgmansrøðuni í gjáramorgunin og løgtingsformaðurin bað flokkarnar siga sær, hvør var teirra framsøgumaður.

Hetta var eingin trupulleiki hjá hinum flokkunum, men tá tað kom til VMF varð innanhýsis stríðið lagt fyri løgtingsformannin.

Ingebrog Winther vísti á, at hinir báðir tingmenninir, sum fyri tveimum árum síðani vórðu valdir á ting fyri VMF, eru koyrdir úr fylkingini, og tí er hon einasta umboð fyri VMF og tí sjálvsagdur framsøgumaður.

Kristian Magnussen vísti á, at tað er tingmanningin hjá VMF, sum ger av, hvør skal vera framsøgufólk, og tá Óli Jacobsen og hann eru meirilutin í VMF, so var avgerðin teir høvdu tikið galdandi. Tí átti hann at vera framsøgumaður.

Jógvan Ingvard Olsen, løgtingsformaður, ynskti ikki at gera seg til dómara í innanhýsis stríðnum, og hann staðfesti, at um VMF ikki kann finna ein framsøgumann, so fingu teir ongan.

Løgmður hevur einki við hetta málið at gera, men tá partarnir nú aftur stríðast um rættindi, er tað áhugavert at leggja til merkis, at í røðuni, sum er til viðgerðar nú, kallar Edmund Joensen teir báðar VMF menninar í samgonguni fyri Verkamannafylkingina á tingi.

Trek byrjan

Sambært tingskipanina fingu framsøgumenninir orðið eftir støddini á flokkunum. Tað vil siga, at Atli Hansen og Óli Breckmann fyri samgonguflokkarnar sambandsflokkin og fólkaflokkin høvdu báðir orðið, áðrenn Jóannes Eidesgaard sum fyrsta andstøðuumboðið fekk orðið. Hetta hevði við sær, at orðaskiftið hevði politiska slagsíðu fyrrapartin ígjár. Onkur helt, at tað hevði verið betri fyri orðaskiftið, um andstøðan slapp longri fram í røðini, men formaðurin helt seg til tað, sum stendur skrivað í tingskipanini.

Stórur hugur at taka orðið

Framsøgumenninir eiga sambært tingskipanini somu talutíð, tá løgmansrøðan verður viðgjørd, sum teir eiga, tá fíggjarlógin er til fyrstu viðgerð. Í fyrsta umfari er hetta 20 minuttir, aðru ferðina 10 minuttir og so eiga teir fimm minuttir hvørja ferð.

Framsøgumenninir fyri hinar flokkarnar vóru Heini O. Heinesen, Alvur Zachariasen, Tordur Niclasen og Lassi Klein. Vanligt hevur verið, at løgmaður tekur orðið, tá allir framsøgumenninir hava verið uppi. Hann og hinir landsstýrismenninir eiga sambært tingskipanina 10 minuttir í fyrsta umfari og síðani fimm minuttir. Tingmenn hava rætt at tala tvær ferðir fimm minuttir.

Løgtingsformaðurin segði í síðstu viku fyri Sosialinum, at hann roknai við, at viðgerðin fór at taka tveir dagar. Sambært tingskipanini skulu tingfundir verða hildnir yrkadagar millum klokkan 9 og 18. Í gjár ætlaðu teir at gevast klokkan klokkan 18.

Taluhugurin tóktist veraa stórur, nú politiska samansetingin er so nógv broytt síðani teir høvdu seinasta stóra orðaskifti. Men hóast tað, so varð í gjár roknað við, at orðaskiftið verður liðugt í kvøld. Formaðurin hevur heimild til at leingja arbeiðsdagin til klokkan 22, og tað kann hugsast, at orðaskiftið verður ikki liðugt akkurát klokkan 18.

Kristian Magnussen segði seg era framsøgumann fyri VMF, men Ingebrog Winther segði, at hon var framsøgumaður fyri VMF. Óli Jacobsen í miðjuni stuðlaði Kristiani

Nú skal alt fáast upp á pláss áðrenn tað kemur niðan í tingið

Politisku samráðingarnar um fíggjarlógina skulu flytast frá nevndarviðgerðini og framum framløguna

JÓANNES HANSEN

At fíggjarnevndin ger semju um endaligu fíggjarlógina við at broyta upphæddirnar á inntøkusíðuni og útreiðslusíðuni, soleiðis at tað passar betri inn í politisku myndina hjá einstøku fíggjarnevndarlimunum gongur ikki longur.

Nú skal politiska viðgerðin av fíggjarlógini flytast úr fíggjarnevndini og til fyrireikingararbeiðið, áðrenn fíggjarlógin verður løgd fram.

Anfinn Kallsberg, fíggjarmálaráðharri, staðfestir, at undir nýggju stýrisskipanarlógini er tað hann, sum hevur ábyrgdina av, hvussu sambandið er millum inntøkusíðuna og útreiðslusíðuna, og hann ætlar sær at syrgja fyri, at tað ikki skal bera til hjá øðrum at gera avtalur, sum hann ikki hevur verið vitandi um, men sum hann hevur lógarásetta ábyrgd av.

- Vit kunnu ikki liva við arbeiðslagnum, sum hevur verið frammanundan, og tí verða tær politisku samráðingarnar um fíggjarlógina í lítlu samgongu, sum altíð skal hava fund 14. hvønn dag, og sum fer at hava nógvar fundir í sambandi við, at fíggjarlógaruppskotið verður evnað til.

Anfinn Kallsberg sigur, at tá semja er fingin í samgonguni um, hvussu fíggjarlógin skal hanga saman fer hann at biðja landsstýrismenninar í ymsu málsøkjunum at syrgja fyri, at teir fáa politiska baklándið uppá pláss, soleiðis at trygd verður fyri, at tað er meiriluti aftanfyri uppskotið, tá tað verður lagt fyri tingið.

- Og eg havi einki ímóti, at andstøðan verður við í hesum samráðingunum. Treytin eg seti er, at hann, sum hevur ábyrgdina, tá verkið er liðugt, eisini er við allan vegin, meðan tað verður smíðað.

Ikki góðar royndir

Jóannes Eidesgaard, formaður í javnaðarflokkinum og landsstýrismaður í fíggjarmálum seinastu tvey árini, er samdur við Anfinni Kallsberg í, at tað er neyðugt at broyta mannagongdina:

- Tá fíggjarnevndin í fjør gjørdi hevði gjørt seinastu avtaluna um fíggjarlógina fegnaðist eg yvir, at tað hevði borið til at fáa so breiða undirtøku fyri lógini, men eg undirstrikaði samstundis av tingsins røðarapalli, at tað fór at fáa avleiðingar, at samtykta uppskotið á fleiri økjum víkti so nógv frá tí, sum fyrisitingin og landsstýrið høvdu lagt fram. Avleiðingarnar, sum eg nevndi, vóru júst tær, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum eigur at vera uppí og stýra samráðingunum.

Átókt í Danmark

Gongur tað, sum fyrrverandi og núverandi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum leggja upp til, so fer arbeiðsmátin í sambandi við politiskar samráðingar og serliga samráðingar um fíggjarlógina at líkjast mátanum, sum hetta verður gjørt í Danmark.

Har hevur tað verið vanligt mesta partin av hesi øldini, at avtalur millum flokkar í meirilutasamgongum og stjórnina og milium minnilutastjórnir, samgonguflokkarnar og onkran andstøðuflokk eru gjørdar undan framløguni í fólkatingið.

Framhald á síðu 7

Marjun er nú komin í nesið

Nýggi forstjórin fylgir við í orðaskiftinum um løgmansrøðuna og hon hevur ivaleyst at takast við

JÓANNES HANSEN

Í gjár var 1. august, og tað var fyrsti arbeiðsdagur hjá nýggja forstjóranum í Tinganesi. Marjun Hanusardóttir var hjartaliga móttikin av politikarum og starvsfólki, tey fingu ein drekkamunn saman, og stjórin heilsaði uppá starvsfólkini, sum hon nú er stjóri hjá.

Forstjórin var ikki í tinginum, tá politikarnir fóru undir at viðgera løgmansrøðuna, men hon ætlaði sær at fylgja við í orðaskiftinum, tá tað varð útvarpað.

Marjun Hanusardóttir, sum er 42 ára gomul og seinastu níggju árini hevur verið stjóri á Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, ber ikki ótta fyri, at hon fer at sita fyri einki, nú hon tekur við sum hægsti embætismaður undir landsstýrinum:

-Eg var nakrar dagar í Tinganesi saman við Finn Norman Christensen, áðrenn hann fór av landinum, og sjálvsagt havi eg eisini á annan hátt roynt at sett meg inn í viðurskiftini í Tinganesi, síðani eg varð sett í hetta starvið, men eg eri greið yvir, at fyrstu tíðina skal eg brúka til at stinga fingurin í jørðina, lurta, eygleiða og hugsa.

Nýggi stjórin veit, at tað eru viðurskifti, sum skulu

Framhald á síðu 7